FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ
MINISTRY OF FINANCE

# Frágreiðing í sambandi við broytingaruppskot landsstýrisins og dagførda inntøkumeting til uppskot til løgtingsfíggjarlóg fyri 2017

Sum vanlig mannagongd og siðvenja er, hevur landsstýrið sent fíggjarnevnd Løgtingsins broytingaruppskot landsstýrisins og dagførda inntøkumeting til uppskot til løgtingsfíggjarlóg fyri 2017.

Broytingaruppskot landsstýrisins eru uppskot til útvaldar tillagingar av rakstrar- og løgujáttanum í fíggjarlógaruppskotinum fyri 2017. Tilsamans er talan um meirútreiðslur á 17,6 mió. kr., harav 15,2 mió. kr. í rakstrarútreiðslum og 2,4 mió. kr. í løguútreiðslum. Størsti parturin av meirútreiðslunum er vegna meirjáttan til Landssjúkrahúsið, og skipan av búplássum til sálarsjúk og nýtt tilboð til demensrakt undir Trivnaðnartænastum.

Dagførda inntøkumetingin, íroknað rentupostar, gevur samanlagt meirinntøkur á 105,6 mió. kr. í mun til fíggjarlógaruppskotið. Hetta er orsakað av, at fleiri inntøkur vísa seg at vera hægri í 2016, enn mett varð, tá fíggjarlógaruppskotið fyri 2017 varð lagt fyri Løgtingið 30. september. Inntøkurnar fyri 2017 verða tí tillagaðar samsvarandi. Størstu broytingar í inntøkunum fyri 2017 eru, at inntøkurnar frá meirvirðisgjaldi verða mettar at verða 45 mió. kr. hægri, at inntøkurnar frá loyvisgjaldi á alivinnu verða mettar at verða 13 mió. kr. hægri, og at inntøkurnar frá avgjaldi á fiskatilfeingi verða mettar at verða 45 mió. kr. hægri.

Samanumtikið er talan um, at RLÚ I úrslitið í fíggjarlógaruppskotinum fyri 2017, eftir broytingaruppskot landsstýrisins og dagførda inntøkumeting, fer frá avlopi á 112,3 mió. kr. upp í avlop á 200,4 mió. kr., t.e. ein hækking á 88,1 mió. kr.

| | **mió. kr.** |
|---|---|
| **RLÚ I úrslit í fíggjarlógaruppskotinum 2017** | **112,3** |
| Broytingaruppskot landsstýrisins | -17,6 |
| Dagførd inntøkumeting | 105,6 |
| **Dagført RLÚ I úrslit fyri 2017** | **200,4** |

**Kristina Háfoss**
landsstýriskvinna

/ **Bjarni Askham Bjarnason**